**SVIMJISAMBAND FØROYA**
Faroe Islands Aquatics Federation (FRO)
Fédération des Îles Féroé de Natation

Limaskapur/Affiliation:
Ítróttasamband Føroya (ÍSF)
Nordic Swimming Federation (NSF)
European Aquatics (LEN)
World Aquatics (AQUA)

# Úttøkuskipan til EM 2026 í París

Starvsnevnd SSF hevur samtykt fylgjandi úttøkuskipan til EvropaMeistarastevnuna á langgeil sum verður í París í Fraklandi frá 10. til 16. august 2026.

Uppá tal eru tey sum í kravtíðarskeiðnum klára avrik yvir 750 AQUA (2026) stig á langgeil (50m).

Sí AQUA 2026 talvurnar her:

- Kvinnur: World-Aquatics-Points-LCM_2026_Female.pdf
- Menn: World-Aquatics-Points-LCM_2026_Male.pdf

Vit kunnu í mesta lagi melda fýra (4) svimjarar av sama kyni til hvørja grein, og verða fýra (4) teir skjótastu tí valdir ífall at fleiri enn fýra (4) klára kravtíðina til somu grein.

Starvsnevndin tilskilar sær rætt at taka út eyka svimjarar, sum lýst í úttøkuskipanini til eyka úttøkur:

https://ssf.fo/kapping/uttokuskipan-til-eyka-uttokur/

Starvsnevndin tilskilar sær hartil rætt at meta um venjingarstøðið hjá viðkomandi svimjarum, út í frá úrslitum svomin síðani 1. januar 2026, og at velja luttøku frá um serligar umstøður tala fyri hesum. Kravtíðarskeiðið er frá og við 27. juli 2025 (HM 2025), til og við 26. apríl 2026 (Swim Open Tórshavn).

Viðkomandi svimjarar skulu hava galdandi antidopingprógv frá Anti Doping Danmark ella WADA, og eiga at luttaka í teimum fyrireikingum sum SSF skipar fyri, íroknað FM, uttan so at annað er avtalað.

Viðkomandi svimjarar skulu góðtaka at luttaka í møguligari liðsvimjing, uttan so at annað er avtalað.

Sí annars “Reglugerð um úttøku og kravtíðir”:
http://www.ssf.fo/felagsskapur/reglugerd/reglugerd-um-uttoeku-og-kravtidir/

Feløgini verða biðin um at fráboða SSF um teir svimjarar sum í kravtíðarskeiðnum hava klárað kravtíð, við tilskilan av grein og tíð, umframt nær og hvar tíðin varð svomin.

Feløgini verða hartil biðin um at fráboða Svimjisambandinum um teir viðkomandi svimjarar ið *ikki* ynskja úttøku, í seinasta lagi tá ið Swim Open Tórshavn byrjar.

Viðkomandi landslið verður úttikið sum skjótast aftaná at kravtíðarskeiðið er runnið.

Fyrivarni verður tikið fyri prentvillum.

Við svimjikvøðu

Starvsnevnd SSF

ATLANTIC AIRWAYS